# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Óhappið vísir, at tilbúgvingin virkar ikki nóg væl, og at myndugleikarnir eru alt ov lagaligir*
*(Umhvørvisfelagsskapurin Bellona)*

# Veðrið tók sær av oljuni

**Nógv bendir á, at veður og vindur bjarga norðmonnum undan einari oljuvanlukku**

Í gjár kærdi StatoilHydro seg um, at tað bar ikki til at taka oljuna frá Statfjord A upp, tí veðrið var ikki til vildar. Í dag bendir alt á, at hetta sama veðrið verður tað, sum bjargar umdømi felagsins, skriva norskir fjølmiðlar.

Alt bendir á, at oljan loysist upp, nú hon verður blandað við sjógv, og tí fær óhappið ikki tær avleiðingar, sum myndugleikarnir bótu ótta fyri í gjár, tá tað var líkt til, at oljan fór at reka inn á strondina.

- Vit hava fingið tekin um, at oljan er í ferð við at loysa seg upp, og tað ger, at hon fer at gera munandi minni skaða á fugl, fisk og plantur, sigur Gisle Johansen hjá StatoilHydro. Kortini hevur felagið gjørt av at lata skip og tyrlur halda eyga við oljuni, sum nú er stutt fra Snorre A-pallinum á Statfjord-leiðini.

Norski havrannsóknarstovnurin heldur ikki, at fiskurin á Statfjord-leiðini fær nakran skaða av oljuni. Stovnurin sigur, at eingi yngul eru í økinum, og um hesa tíðina er makrelurin so langt niðri í sjónum, at hann kemur ikki í samband við oljuna.

- Í økinum eru eisini upsi, toskur og longa, men vit vænta, at hesi fiskasløgini sleppa uttan nakað mein, sigur havrannsóknarstovnurin í einari fráboðan.



*Óhappið hendi, tá tangaskipið „Navion Britannia“ var í ferð við at taka olju við eina avskipingarboyu við pallin Statfjord A*



*Umleið 3.800 rúmmetrar av ráolju fóru í havið, og óhappið er tað næstringasta av sínum slagi í norsku oljusøguni*
*(Mynd: Aftenposten)*

# Taka Madeleine niður

**Tær flestu plakatirnar av Madeleine McCann eru nú tiknar niður í Praia da Luz**



*Í Praia da Luz eru ikki nógvar plakatir eftir við mynd av Madeleine McCann*
*(Mynd: Polfoto)*

Madeleine McCann hvarv í portugisiska frítíðarbýnum Praia da Luz um kvøldið tann 3. mai, og síðani hevur eingin hoyrt frá henni.

Líka síðani hon hvarv, hava stórar og smáar plakatir við mynd hennara hingið á gistingarhúsum og matstovum í Praia da Luz, tikið plakatirnar niður. Tað sama hevur presturin, sum foreldur hennara, Kate og Gerry McCann, vóru til bønarløtu við, gjørt. Plakatirnar, sum hava hingið í kirkjuni teir seinastu mánaðirnar, hanga ikki har longur.

Ein av matstovueigarunum sigur við bretska blaðið Daily Mail, at tey hava ikki tikið plakatirnar, tí tey hava gloymt Madeleine, ella tí tey hava mist áhugan fyri lagnu hennara. Tann einasta orsøkin er, at býurin hevur tørv á at venda aftur til tann gamla gerandisdagin, tí tað seinasta hálva árið hevur Madeleine verið umrøðuevnið í býnum, sigur hann.

Men tað er eisini ein onnur frágreiðing. Fleiri fólk í Praia da Luz, sum Daily Mail hevur tosað við, siga, at tey duga ikki at síggja nakra orsøk til at sóknast eftir gentuni, so leingi foreldur hennara eru undir illgruna.

Talsmaðurin hjá McCann-hjúnunum, Clarence Mitchell, sigur við sjónvarpið Sky, at hjúnini hava ikki

## STUTT SAGT

### Rice rósar Medvedev

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Coldoleezza Rice, rósar Dmitrij Medvedev, sum eftir øllum at døma verður næsti forseti í Russlandi. Við tíðarritið USA Today sigur Rice, at hon hevur hitt Medvedev nakrar ferðir. Hon heldur, at hann er evnagóður, og hon væntar, at hann fer at fáa stóran týdning fyri russiskt vinnulív, so tað væntandi verður meiri fjølbroytt í framtíðini. Condoleezza Rice vísir á, at Dmitrij Medvedev er 42 ára gamal og umboðar sostatt eitt nýtt ættarlið í russiskum politikki. USA Today heldur lítlan iva vera um, at Medvedev verður valdur til forseta. Blaðið vísir á, at Vladimir Putin styðjar hann, og at ein meiriluti av russisku veljarunum siga seg fara at atkvøða fyri tí valevninum, sum fær viðmæli frá Putin.

### Brown góða vón

Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, ivast ikki í, at teir útlendsku hermenninir í Afghanistan fara at vinna á Taliban. Hann eggjaði samstundis fyrrverandi limum í Taliban til at styðja verandi stýri og at medvirka til at endurbyggja landið. Gordon Brown hevur júst verið í Afghanistan, har hann vissaði Hamid Karzai, forseta um, at Bretland styðjar stjórnina í Kabul, og at teir bretsku hermenninir verða verandi í landinum.

### Gjørdi sum løgreglan

Tann 63 ára gamli amerikanarin Timothy Krajcir viðgekk herfyri, at hann beindi fyri níggju fólkum í statinum Missouri í sjeyti- og áttatiárunum. Løgreglan sigur, at hann framdi tað fyrsta morðið í 1977 ella fyri 30 árum síðani, men tann stóri spurningurin hjá løgregluni er, hvussu maðurin kláraði at fjala seg so leingi. Nú vísir tað seg, at Timothy Krajcir las sálarfrøði sum ungur, og at hann brúkti nógva tíð til at kunna seg um, hvussu løgreglan arbeiðir, tá hon skal avdúka drápsmenn. Við hesum kunnleika eydnaðist tað honum at fjala seg fyri løgregluni í 30 ár, sigur CNN.